## Útlandið løðir

Burmesiska stjórnin gevur "oyðileggjandi eindum" skuldina fyri ófriðin, sum hevur verið í Burma seinastu vikurnar. – Tað eru nakrar oyðileggjandi eindir bæði innanfyri og uttanfyri okkara landamørk, sum øvunda Myanmar, ið er eitt friðarligt og framkomið land, og tey mótmælini, sum vit nú síggja, eru løgd tilrættis í útlandinum, sigur Tura Myint Maung, ráðharri í religiónsmálum.



## Frælsishetja í húsavarðhaldi

Stóra frælsishetjan í Burma er Aung San Suu Kyi. Hon varð sett í húsavarðhald í 1989, men demokratiski flokkurin, ið hon stóð á odda fyri, vann kortini valið, sum var fyriskipað í 1990. Hernaðarstýrið viðurkendi tó ikki úrslitið, og Suu Kyi var sitandi í húsavarðhaldi til 1995. Síðan 2000 hevur hon við jøvnum millumbilum sitið í húsavarðhaldi. Hon vann Friðarheiðursløn Nobels í 1991.

# Munkar bjóða her

**Øll eygu heimsins eru í hesum døgum vend ímóti tí afturlatna landinum Myanmar (eisini nevnt Burma), hvørs hernaðarjunta hevur knúskað allar demokratiskar rørslur við harðari hond seinastu mongu árini. Yvirfyri teimum jarnhørðu generalunum, ið goyma seg handan stríðsvognar og alvápnaðar herdeildir, standa buddhistiskir munkar við einum boðskapi um kærleika, frið og frælsi. Spurningurin er, um hernaðarstýrið fer at hóra undan, ella um demokratisku kreftirnar loksins megna at koppa tí harðrenda einaræðinum**



## Burma

**Stefan í Skorini**
stefan@sosialurin.fo

Tá stjórnin í Burma um miðjan august gjørdi av at tvífalda prísin á brennievni, var brádliga ovboðið hjá einum stórum parti av burmesiska fólkinum. Beinanvegin sóust tilvildarligar mótmælisgongur kring landið, og herurin royndi at steðga mótmælandi mannamúgvunum alt fyri eitt.

Mótmælisgongurnar mentust tó spakuliga, og seinastu tíggju dagarnar hava hundraðtúsundtals fólk verið úti í gøtunum og gjørt vart við sína ónøgd við landsins leiðslu. Teir mongu buddhistisku munkarnir í landinum hava gingið á odda frá byrjan av, men teir hava nú fingið stuðul frá vanliga fólkinum eisini. Nógv bendir tí á, at fólkið í Burma tekur undir við mótmælunum, sum munkarnir hava birt uppundir.

Í skrivandi stund hevur hernaðarstýrið sent hermenn og stríðsvognar út á gøturnar at berja uppreisturin niður við táragassi og kniplum. Harumframt verða ávaringarskot latin av ímóti mannamúgvuni. Áðrenn evstamark fættu um tey fyrstu mótmælisfólkini, ið hava latið lív. Spurningurin er nú, hvussu leingi mótmælini fara at vara, og hvussu harðliga stjórnin ætlar at fara til verka.

### Heimurin hyggur at

Meðan munkar, studentar og onnur vísa sína ónøgd og krevja broytingar í gøtunum í Rangoon og hinum stóru býunum í Burma, fylgja heimsins leiðarar væl við gongdini í hesum fjarskotna landinum í Fjareystri.

Amerikanski forsetin George Bush hevur longu boðað frá, at USA fer at herða tey økonomisku tiltøkini, sum USA og ES hava sett í verk ímóti Burma.

Eygleiðarar meta tó, at sanktiónir ímóti burmesiska stýrinum ongan veruligan týdning hava. Hesar sanktiónir hava verið í gildi í fleiri ár, men hernaðarstýrið er ikki viknað av hesi orsøk, og tí hava tær seinastu útmeldingarnar hjá vesturlendskum leiðarum bert symbolskan týdning. Burmesiskir útisetar vísa eisini á, at hesar sanktiónir bert raka vanliga fólkið og ikki hernaðarstýrið, sum livir fjart frá veruleikanum á gøtuni.

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, krevur, at ST-trygdarráðið verður kallað saman at viðgera støðuna í fyrrverandi bretsku koloniini. ST-trygdarráðið hevði í hyggju at samtykkja eina resolutión ímóti hernaðarstýrinum í januar í ár, men Kina nýtti sín veto-rætt, og samtyktin vann tí ikki frama.

### Eitt land í armóð

Burma hevur verið stýrt av herinum síðan 1962, tá herleiðslan framdi eitt kvett ímóti landsins fólkavalda stýri, og seinastu mongu árini hevur ein stórur partur av fólkinum livað í ringastu armóð.

Stjórnin í Burma nýtir nærum ein helming av allari landsins fíggjarlóg til herin. Hetta merkir sjálvandi, at lítið av pengum

Sosialurin